# Høgguslokkar eru »gløggir«

NÁTTURA
*Vilmund Jacobsen*

Tað tekur eftir øllum at døma ikki langa tíð hjá einum hølguslokki at læra seg at skrúva lokið av eini krukku fyri at sleppa fram at matinum, sum er í krukkuni.

Hetta visa kanningar, sum granskarar hava gjørt.

Granskarar og starvsfólk, sum starvast við eitt fiskabúr í bretska býnum Tynemouth, eru nevniliga ovfarnir av høgguslokkinum "Einstein", sum bleiv funnin á eini strond og flutt livandi til fiskabúrið.

Tann hálvan metur langi høgguslokkurin er navngivin eftir sínum viti - um vit kunnu siga so; tí fekk hon navnið, "Einstein".

Frammanundan høvdu bretsku granskararnir hoyrt um ein amerikanska høgguslokk, sum eisini hevði skrúvað lokið av eini krukku.

"Einstein" fekk somu uppgávu sum tann amerikanska, ið vit ikki kenna navnið á.

Eftir at "Einstein" hevði roynt einar tvær ferðir, kláraði høgguslokkurin at skrúva lokið av krukkuni, so hon slapp til matin, sum í henni var.

Hesum vóru granskararnir ovfarnir av, skrivar norska Nettávísin.

*Í Noregi kunnu fiskimenn noyðast í land, um teir eru ov feitir sambært BMI-reglunum hjá ES. Málið hevur verið frammi í norska stórtinginum. Á fundunum millum føroyska og norska fiskimálaráðharran herfyri varð ikki orð grett um hesi viðurskifti.*
*- Nei, hatta tosaðu vit ikki um, tí hasar reglurnar havi eg als ikki hoyrt um, sigur Jørgen Niclasen, sum her er avmyndaður á Hellunum saman við norska starvsbróðuri sínum, Svein Ludvigsen.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Gav krabbamonnum fyrimunir og noyðist í geglið

**Kendi russiski samráðingarleiðarin á fiskivinnuøkinum, Mikhail Dementjev, er dømdur 5 ára fongsulsrevsing fyri at hava givið skeivar upplýsingar**

REVSING
*Vilmund Jacobsen*

Fyrrverandi leiðarin fyri russisku samráðingarnevndini, Mikhail Dementjev, sum hevur leitt nógvar fiskivinnusamráðingar fyri Rusland, er dømdur 5 ára fongsulsrevsing.

Hetta veit norska Fiskeribladet at siga.

Dementjev var næstformaður í samráðingarnevndini og hevði ábyrgdina av samráðingunum vegna Rusland, tá ið hesar vóru við norðmenn um kvotur í Barentshavinum í november ár 2000.

Sum samráðingarleiðari man Dementjev eisini vera kendur í Føroyum.

### Tap fyri statin

Við russiskum keldum sum grundarlagi, skrivar Fiskeribladet, at Dementjev er dømdur fyri at hava givið skeivar upplýsingar um kvotur í samband við krabbafiskiskapin við russisku Kyrrahavsstrondina.

Skeivu upplýsingarnir skulu hava givið fiskimonnum, sum royna eftir krabba, nakrar fyrimunir.

Dómsvaldið í Ruslandi metir, at Dementjev hevur ábyrgdina av einum tapi fyri russiska statin uppá 1,5 miljónir dollarar.

# Ov feitir fiskimenn noyðast í land

**Sonevndu BMI-reglurnar (Body Mass Index) hjá ES hótta nú við at koyra fiskimenn og sjófólk, sum eru ov feit, í land.**
**– Hesar reglur kenni eg einki til og havi ikki hoyrt um tær áður, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Norsk bløð skriva, at stórtingslimurin, Bendiks Harald Arnesen, sum umboðar Arbeiðaraflokkin, herfyri tók málið um BMI-reglurnar hjá ES upp í stórtinginum.

Hann vísti á, at vinnulívsráðharrin, Ansgar Gabrielsen, í vetur lovaði at rudda upp í tí ógreiða í málinum og vísa fleksibilitet í samband við hesar reglur.

Bendiks helt tað vera neyðugt at taka málið uppaftur eftir, at ein fiskimaður í Finnmørkini er raktur av reglunum.

Í einum svari, sigur vinnulívsráðharrin, at alt er ein trygdarspurningur.

### Ikki útróðrarmenn

Nógvir fiskimenn hava trupulleikar við at halda vektina.

- Eg eri glaður fyri mat og dragist við nøkur kilo ov nógv, sigur ein norskur útróðrarmaður, sum tó ikki heldur tað vera rætt, at hann skal koyrast í land, tí hann ikki passar inn í nakrar ES-reglur um avmarkingar í vekt.

Hann væntar ikki, at BMI-reglurnar fara at fevna um útróðrarvinnuna.

Útróðrarmaðurin, vit tosa um, er ein stórur og bulmikil maður, sum kortini neyvan fellir fyri reglunum um fiti.

Hann heldur, at matur er góður, men hann hevur eisini gjørt nakrar miseydnaðar royndir at sleppa av við nøkur kilo.

- Tað er hóast alt eisini nakað, sum kallast "trivnaðarvekt" - tann vektin, tú trívist við.

Útróðrarmaðurin er tó minni enn so tann einasti, ið brúkar sjóklæðir, sum eru "ekstra ekstra large", tá ið hann er á sjónum.

Tann fyrsti norðmaðurin, sum er raktur av ES-reglunum um fiti, er ein trolmaður í Finnmørkini.

### Stór vekt, meira slit

Maðurin, vit hoyrdu um í áðni, heldur ikki, at hann sum útróðrarmaður er umfataður av BMI-reglunum, tí honum nýtist onga sjómansváttan.

- Men skuldi eg farið við einum trolara, trúgvi eg neyvan, eg hevði lúkað BMI-reglurnar fyri fiti.

Útróðrarmaðurin gerst tó ikki skakkur, sigur hann, um reglurnar í framtíðini eisini koma at fevna um útróðrarmenninar.

Á ein hátt sigur hann seg skilja, at krøv verða sett til heilsuna.

- Yvirvekt merkir jú, at ryggur og bein slítast meira - og datt eg fyri borð, hevði eg ikki við egnari hjálp sloppið uppí bátin aftur, sigur útróðrarmaðurin, sum saman við mongum øðrum fiski-og útróðrarmonnum kann vænta at verða vigaður av ES - og funnin ov tungur…

### "Hatta veit eg einki um"

Sosialurin vendi sær til Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharra, og spurdi, um hetta var eitt av málunum, hann og norski fiskimálaráðharrin, Svein Ludvigsen, tosaðu um á fundunum í Føroyum herfyri. Men so er ikki.

- Nei, hatta tosaðu vit ikki um, tí hasar reglurnar havi eg als ikki hoyrt um áður, sigur Jørgen.

Tá ið vit nevndu BMI (Body Mass Index) fyri fiskimálaráðharranum, segði tað honum heldur ikki nakað.

Landsstýrismaðurin visir á, at fiskimenn og sjófólk annars skulu hava eina heilsuváttan, men hann veit einki um, at menn ikki eru slopnir at sigla, tí vektin hevur verið ov stór.

- Nei, eg má siga, at hatta kenni eg einki til, sigur Jørgen Niclasen.



# Narkomálið heldur fram



*Málið móti til 36 ára gamla dananum, sum fekk nærum trý ára fongsulsrevsing fyri smugling og sølu av narkotika, verður tikið uppaftur nú. Tey bæði vitnini, sum ikki kundu møta í rættinum, skulu nú vitna, eftir at tey hava fingið sín dóm*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Tvey vitni, sum ikki kundu møta, tá høvuðsákærdi í narkomálinum var fyri í Føroy Rætti, koma nú fyri rættin. Tann eini er ákærdur fyri at hava keypt tíggju kilo av hassji frá 36 ára gamla dananum, sum longu hevur fingið fongsulsrevsing á nærum trý ár**

NARKOMÁLIÐ
Stefan í Skorini

Fríggjadagin fekk ein maður 60 daga fongsulsrevsing fyri at hava keypt 300 gramm av hassji, sum hann síðani hevur selt víðari til nýtarar, og fyri at hava keypt 360 gramm av hassji til egið brúk. 30 dagar av dóminum eru treytaðir, og maðurin skal inn at sita seinni.

Hassjið er keypt frá 36 ára gamla dananum, sum longu hevur fingið dóm. Lógarbrotini eru framd yvir eitt trý ára tíðarskeið.

Tann dømdi skal nú vitna í málinum móti høvuðsákærda í stóra narkomálinum. Rættarfundurin verður í dag, mikudagin, tá hann skal geva vitnifrágreiðing. Ákæruvaldið hevur nýtt tann framferðarháttin frá byrjan av, at fyrst verða vitnini ákærd og fáa dóm, og síðani verða tey kallað inn sum vitni í øðrum málum.

### Viðgekk seg ikki sekan

Ein annar maður var í rættinum mánadagin ákærdur fyri at hava keypt í minsta lagi tíggju kilo av hassji við tí fyri eyga at selja hassjið víðari. Sølan millum høvuðsákærda og hendan mannin skal hava farið fram yvir eitt trettan ára tíðarskeið.

Maðurin vildi ikki viðganga, at hann hevur keypt tíggju kilo av hassji í hesum tíðarskeiðnum. Hann vil bara kennast við umleið 90 gramm, sum hann sigur seg hava keypt, hóast hann áður undir avhoyring í rættinum hevur viðgingið at hava keypt tíggju kilo.

Tí var rættarmálið útsett til týsdagin í næstu viku, tá rættarfundurin verður uppafturtikin. Tá skal tað síðsta vitnið svara spurningum frá ákæranum og verjanum, og dómur fellur væntandi í næstu viku.

Umframt at vera ákærdur fyri keyp og sølu av hassji er maðurin eisini ákærdur fyri innbrot á landssjúkrahúsinum og í einum handilsdepli í Klaksvík og fyri harðskap.

Hesin maðurin skal eftir ætlan vitna ímóti 36 ára gamla dananum, sum løgreglan heldur er ein av høvuðsmonnunum í narkosølu í Føroyum seinastu árini.

Ætlanin var upprunaliga, at hesir báðir menninir skuldu vitna, tá rættarmálið var fyri í Føroya Rætti, men báðir vóru til skips, og tí verða teirra mál avgreidd nú.

# Ása ársins songrødd

**Tíðindaskriv**

Leygarkvøldið 29.juni var finalan í Ársins Songrødd 2002 uppi í Badmintonhøllini. Nógv fólk høvdu leitað sær niðan hetta kvøldið, og tey vóru vitni til at sera gott og vælskipa tiltak. Aftaná at ein vælupplagdur James Olsen við fýra dansigentum hevði framført eitt framúrskarandi show, bleiv úrsliti kunngjørt, og tá ið avtornaði varð tað Ása Kathy Dam úr kollafirði sum vann. Nummar tvey bleiv Olivia Mikkelsen úr Gøtu og nummar trý Bleiv Rannvá Lutzen úr Klaksvík. Pallurin varð stórur og rúmligur, við stórskíggjum og eitt stórt stilas sum rakk heilt upp í loft. Ovast uppi í stilasinum stóð DJ´arin Martin Kjærbo, meðan dansigentur dansaðu í hvør sínum rúm undir honum, sera flott at síggja til. Rás 2 sum sendi beinleiðis alt kvøldið, fer at endursenda »Finalan Ársins Songrødd 2002« seinni í vikuni, (sí skránna hjá Rás 2).

1. vinningur var kr. 10.000,-,

2. vinningur gávubræv áljóðandi kr. 5.000,- frá Føroya banka Konto´in og 3. vinningur, ein rúgva av gávulutum frá stuðlunum.


**GÓÐIR BRÚKTIR BILAR**

**Nissan Micra 1,0 GX**
gráur, 5 hurðar,
árg. 1999, 27.000 km.
**85.000**

**Nissan Micra 1,0**
grønur, 3 hurðar,
árg. 2000, 27.000 km.
**88.000**

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1997, 110.000 km.
**110.000**

**Nissan Almera 1,6**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1996, 66.000 km.
**75.000**

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1998, 119.000 km.
**110.000**

**Nissan Sunny 1,6 LX**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1987.
**15.000**

**Nissan Primera 2,0 SLX**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1997, 45.000 km.
**105.000**

**Peugeot 106 Diesel**
bláur, 3 hurðar,
árg. 1997, 97.000 km.
**66.000**

**Peugeot 306 DT 1,9**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1997, 150.000 km.
**90.000**

**Peugeot 605 SRDT 2,1 Aut.**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1994, 230.000 km.
**120.000**

**Opel Corsa 1,2**
grønur, 3 hurðar,
árg. 1996, 40.000 km.
**65.000**

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
**67.000**

**Opel Astra 1,6**
svartur, 5 hurðar,
árg. 1998, 55.000 km.
**105.000**

**Opel Vectra 1,4**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1990, 255.000 km.
**26.000**

**Subaru 1600**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1989, 140.000 km.
**10.000**

**Saab 900 2,0i**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1996, 129.000 km.
**110.000**

**Saab 900**
reyður, 3 hurðar,
**12.000**

**Fiat Tipo**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1990, 196.000 km.
**10.000**

**Honda Civic 1,4is**
grønur, 3 hurðar,
árg. 1998, 101.000 km.
**99.000**

**Subaru Legacy 1,8 GL**
beige, 4 hurðar,
árg. 1991, 120.000 km.
**30.000**

**Gevi gætur: Bilarnir á listanum kunnu ver a seldir**
Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

**P/F Meinhardt Arge**
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin